# Dagtilhald hátíðarhelt føðingardag



Mamy Dahl Sørensen, leiðari á Dagtilhaldinum Sóljan, kann í hesum døgum gleðast um bæði føðingardag og útbygging

*Mynd: Ben Rasmussen*

Dagtilhaldið, Sóljan, hátíðarhelt í seinastu viku 20 ára føðingardag við móttøku í Skálanum í Klaksvík.
Um 150 fólk vóru í Skálanum, og millum gestirnar vóru bæði fólk sum dagliga vitja dagtilhaldið, heilsustarvsfólk og avvarandi.
Á skránni var nátturði, drekka, talur og tónleikur. Fólk hugnaðu sær, Vísumenn úr Klaksvík spældi, og egnað orkestri hjá Sóljuni, Sóljubandið, spældi eisini.
Mamy Dahl Sørensen, leiðari á dagtilhaldinum sigur, at árliga hava tey yvir 4000 vitjanir, og vanligar dagar liggur talið millum 20 og 30. Onkran dag í vikuni ganga tey túrar og av og á eru undirvísing og fyrilestrar á skránni, men annars hugna tey sær, práta, spæla kort og fáast við ymiskt handaligt. Í næstum skal tilhaldið byggjast út.

**DH**



*Martha Østerø lurtar, meðan Hans Hjalti Skaale úr Vísumonnum spælir*

*Mynd: Ben Rasmussen*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnaparrtin minkar hann vindin niður í lot. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin um 4 stig.Seinnapartin snarar hann í útsynning og regn ella mjørki. Hitin kemur upp í eini 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt, men támut vegur. Eisini onkur sólglotti og hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og támut, men yvirhøvur turt veður. Hitin millum 8 og 12 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -3 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 14 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 7 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 10 |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 8 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 12 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 21 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 26 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 18 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 27 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 20 |
| New York | 18 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | -- |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 972 hPa. skamt norðan fyri Føroyar fer spakuliga í landnyrðing.




**Í dag:**
Eitt hátrýst, 1024 hPa. við Írland fer spakuliga í landnyrðing. Ein hátrýstryggur til Íslands verður yvir Føroyum hósnáttina. Lágtrýstið við Hvarvið fer í landnyrðing og hitabrúgvin haðani verður væntandi við Føroyar hóskvøldið.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/10 kl. 06[00] – 10/10. 06[00]. Hitin í gjár: 5,3°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 09/10 kl. 06[00]– 10/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 25,0 mm


## Tiltøk í Miðlahúsinum

**16. oktober kl. 20**
*Føroya Væl*

**Mikudagin 17 oktober kl. 16**
*Bragdið 60 ár*

**Mikudagin 17. Oktober kl. 19.30**
*Psykoterapiútbúgving*

**24. oktober**
*Demokratia*

**25. oktober**
*Føroyskt Lógarrit*

FØROYABANKI
*stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum*

Lesið Sosialin -tað loysir seg


## VESTFALLSKYRRINDI

11. oktober Tendring
13. oktober Mánin longst frá jørðini
19. oktober Fyrra kvarter
26. oktober Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15 . okt. | 10.10 | 22.33 | 09.10 | 21.33 | 09.25 | 21.48 | - | 12.10 | 00.48 | 13.10 | 08.25 | 20.48 | 07.25 | 19.48 | 10.25 | 22.48 | 11.25 | 23.48 | 09.55 | 22.18 | 11.10 | 23.33 |
| 16 . okt. | 10.56 | 23.19 | 09.56 | 22.19 | 10.11 | 22.34 | 00.33 | 12.56 | 01.33 | 13.56 | 09.11 | 21.34 | 08.11 | 20.34 | 11.11 | 23.34 | - | 12.11 | 10.41 | 23.04 | 11.56 | - |
| 17 . okt. | 11.42 | - | 10.42 | 23.05 | 10.57 | 23.20 | 01.19 | 13.42 | 02.19 | 14.42 | 09.57 | 22.20 | 08.57 | 21.20 | 11.57 | - | 00.34 | 12.57 | 11.27 | 23.50 | 00.19 | 12.42 |
| 18 . okt. | 00.05 | 12.28 | 11.28 | 23.52 | 11.43 | - | 02.05 | 14.28 | 03.05 | 15.28 | 10.43 | 23.07 | 09.43 | 22.07 | 00.20 | 12.43 | 01.20 | 13.43 | - | 12.13 | 01.05 | 13.28 |
| 19 . okt. | 00.52 | 13.29 | - | 12.29 | 00.07 | 12.44 | 02.52 | 15.29 | 03.52 | 16.29 | 11.44 | - | 10.44 | 23.21 | 01.07 | 13.44 | 02.07 | 14.44 | 00.37 | 13.14 | 01.52 | 14.29 |